# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroyingar á ráðstevnum

Nú er aftur ráðstevnutíð. Her heima og í útlandinum. Neyvan nakað fólk og nøkur tjóð man verða so væl umboðað á ráðstevnum sum vit. Onkur vil helst siga, at inflatión er komin í hetta at vera við á ráðstevnum. Onnur vilja siga, at hetta hevur alstóran týdning, tí á henda hátt eru vit við til at menna okkum og halda okkara vitan við líka. Hetta hevur nakað við at varðveita okkara fakliga førleika á øllum økjum og ikki minst er tað ein týðandi súla undir demokrtiinum og tað at vera eitt framkomið land.

Júst í hesum døgum luttaka føroyingar á tveimum týðandi ráðstevnum í útlandinum. Umboð fyri stovnar og fyritøkur eru við á veðurlagsráðstevnu í Keypmannahavn. Hóast mong halda, at vit muna so lítið, tí vit eru so fáment, so er hetta ikki so. Vit muna eisini sum partur av eini størri heild. Vit eiga at kenna ábyrgd ikki bert av okkum sjálvum men eisini sum partur av einum størri heimi. Okkara geografiska støða setir so sanniliga eisini krøv til okkum, tá tað snýr seg um veðurlagið, um alternativar orkuhættir, um burðadygga vinnu osfr. Hetta er alt nakað, sum er tætt knýtt at hvørjum øðrum og hvørs framtíð eisini er úrslit av teimum gerðum og avgerðum vit taka.

Tað er gleðiligt, at stovnur sum SEV tekur spurningin um veðurlagið og alternativar orkuhættir í álvara. Tað er alla æru vert og skulu vit her geva SEV-leiðsluni tað rós hon hevur uppiborið. Harvið eru ikki aðrir stovnar og fyritøkur so sum Havstovan, Bitland og onnur gloymd. Øll hesi hava týdning. Tykkara áhuga og innsatsur er eisini við til at gera vanliga føroyingin meira bevístan um hesi týðandi mál.

Ein onnur ráðstevna, sum verður hildin í hesum døgum, er altjóða oljuráðstevnan í Aberdeen, har kolvetni eru á breddanum, men eisini har verða týðandi tættir í sambandi við veðurlagið og framtíðar loysnir her umrødd. Tað er ikki minst umráðandi, at tey, sum í dag vara av og standa á odda innan olju- og gassframleiðslu gera íløgur í eina minni dálkandi framtíð. Føroyingar eru eisini við í Aberdeen. Fyri at læra og fylgja við. Men eisini fyri at marknaðarføra okkara landgrunn, sum møguliga goymir kolvetni. Soleingi olja og gass eru so týðandi partur av okkara forbrúki og tørvi, eiga eisini vit at kanna, um hesin tørvur kann nøktast við ráevnum úr okkara undirgrund. Vitandi at stóri bretski heimamarknaðurin hungrar eftir gassi til gerandisbrúk í milliónum av húsarhaldum, so eiga vit sjálvandi at vita, um okkara undirgrund goymir eitt nú gass, sum so kann gera okkum minni bundin at fiskastovnunum, sum vit tíverri síggja verða og hart troyttir í mongum førum. Kann ein olju- og gassídnaður her taka trýstið av ovveiðuni eftir hart troyttum fiskastovnum, so er eisini nógv vunnið her. So vit eiga at slíggja alt hetta í samanhang.

Hetta eru viðurskifti og mál, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eru partur av ráðstevnum, sum vit luttaka á. Tað er í altíð tú kemur heimaftur við ítøkiligum úrslitum, men nakað situr eftir í bakhøvdinum, slik luttøka gevur tær, tíni fyritøku ella stovni og í síðsta enda tínum landi nakað virðismikið – eina barlast.

**Sosialurin**

# Føroyskt cleantech í Bella Centrinum

**Undir heitinum BlueGreenFuture marknaðarførur Bitland føroyskar fyritøkur uttanlands**

UMHVØRVI
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Á ráðstevnan Nordic Climate Solutions í Keypmannahavn hittast tøkniveitarar, keyparar, íleggjarar, politikkarar, granskarar og fjølmiðlafólk frá øllum Europa til at kunna seg um hvat hendir innan sonevnda Cleantech, sum er altjóða felagsheitið fyri tøkni og loysnir, sum spara um orkunýtslu og minka um skaðilig umhvørvisárin. Ráðstevnan er týsdagin og mikudagin í hesi vikuni.

Orka og umhvørvið gongur aftur í tí sum verður havt á lofti. Føroyskar fyritøkur eru eisini við og bjóða seg fram, og Hákun Djurhuus, stjóri á SEV, telist millum røðararnar saman við Connie Hedegaard, veðurlagsráðharra. Tey fara saman við øðrum leiðarum og serfrøðingum at viðgerða hvussu vit kunnu menna viðvarandi orkutøkni, minka um skaðilig umhvørvisárin og tryggja eina burðadygga framtíð.

### Big business

Cleantech er ikki longur bara rætt og neyðugt og stuðlað av idealistiskum kreftum. Cleantech verður av mongum mett sum tað nýggja "Big Business", tað næsta rákið, megatrendurin – og ein einastandandi møguleiki fyri fólk og vinnur, sum vilja veita loysnir til teir avbjóðingar, sum standast av veðurlagsbroytingunum.

Av hjálparpakkum, sum altjóða fíggjarkreppan hevur fingið stjórnir kring heimin at samtykkja, verður mett, at 3.000 mia$ eru avsettar til Cleantech.

Í desember í ár verður stór veðurlagsráðstevna í Keypmannahavn. Nordic Climate Solutions er íkasti hjá vinnuni í mun til ST veðurlagsráðsetvnuna – eisini nevnd COP-15.

### BlueGreenFuture

Í samband við ráðstevnuna samskipar Bitland átakið BlueGreenFuture.com. Hetta átak hevur sín uppruna í Trans Atlantic Climate Conference í fjør, har m.a. Al Gore luttók. Endamálið er m.a. at marknaðarføra føroyskar orkuloysnir og verkætlanir, umframt at samskipa gransking um veðurlagsbroytingar og alternativar orkuhættir í norðurhøvum.

Mett verður, at vit á nøkrum økjum hava serligar fortreytir at verða við í fremstu røð á Cleantech økinum. Vit hava fleiri fyritøkur, sum hava sera framkomnar cleantech loysnir og sum kunnu gera seg galdandi á marknaðinum, serliga innan maritima øki. Hetta eru loysnir og skipanir, sum spara um orkunýtslu, framleiða varandi orku, minka um dálkandi útlát og skipanir, sum geva fyritøkum og stovnum betri førleikar til at virka á burðardyggum grundarlagi.

Á Nordic Climate Solutions luttaka umboð fyri fyritøkurnar Decision3, Data Quality Systems, Ocean Rainforest, SeWave, Keel Solutions og Bitland. Hesar fyritøkurnar fara at bjóða fram tænastur, umframt at samskifta við útlendskar samstarvspartar og møguligar íleggjarar, sum kunnu verða við í framtíðar vakstrarætlanum.

Harumframt verður eisini arbeitt víðari við, at kanna møguleikarnar fyri at stovnseta BlueGreenFuture sum eitt samstarvsforum, sum virkar tvørtur um atlantshavi. Ætlanin er, at stovnurin skal hava høvuðssæti í Føroyum og skal m.a. sjónliggera Føroyar á Cleantech økinum. Í hesum sambandi verður skipað fyri "Network Reception" á felagsbásinum hjá SEV og BlueGreenFuture.

Meira verður at frætta í morgin um føroysku luttøkuna á Nordic Climate Solutions.

# Hví skal eg gjalda fyri heilivágin hjá Hans Paula Strøm?

**CHRISTOFFER JENSEN**
Klaksvík



Í Sosialinum nr.169 frá 7. september 2009 leggur Hans Pauli Strøm Sosialin undir ótespiligan journalistik.

Sambært Hans Paula er heilivágur í grundini ódýrari enn áður. Sjálvur sigur HPS seg hava fingið Coversyl (Fyri hjartað) í fleiri ár, og kostnaðurin var 541,53 kr. fyri pakningin við 90 tablettum. Nú hevur so kommunulæknin givið honum Corodil.Kostnaðurin er 21,10 fyri 100 tablettir. Hans Paulasa partur er nú 10,60 kr.

Tá eg var yngri, plagdu vit onkuntíð at arga onkrar kendar javnaðarmenn við at siga:"Tit duga at javna til tykkum sjálvar".

Nú eri eg diabetikari og taki Coversyl Novum 2,5 milligram (fyri nýrini). Hesin heilivágur hevur kostað mær 137,42 kr. fyri 90 tablettir.Eftir 13.juli 2009 kostar heilivágurin 581,73 kr. fyri somu 90 tablettir.

Men eg kann ikki, sum HPS , skifta yvir til Corodil.Tað er ikki líkamikið, hvat nýraheilivág tú tekur, og sambært mínum kommunulækna fæst Corodil ikki í 2,5 mg. Minsta mongd er 5 mg, og tablettirnar eru litlar og rundar ,so tað ber neyvan til at klúgva tær. Og so er okkurt annað aftrat, sum forðar.

Tískil noyðist eg framhaldandi keypa tær dýrkaðu tablettirnar. Hartil kemur so, at annar diabetikaraheilivágur er dýrari, kostískoytið skorið niður við meiri enn helvt og fótaróktin í vanda.

Eg havi altíð tikið undir við tí solidariska hugtakinum.Men eg dugi ikki at skilja, hvussu tað sampakkar við, at eg og mínir javnlíkar (diabetikarar) nú skulu til at gjalda meira fyri at Hans Pauli Strøm kann fáa bíligari heilivág.

Kanska er tað soleiðis sum George Orwell sigur í "Animal Farm". "Tó at vit øll eru líka, so eru summi meira líka enn onnur."

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.